# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TEY HAVA SPILT OKKUM GRINDINA

Tað var áhugavert at hoyra Skannaran í útvarpinum í gjár, har evnið var grindadráp og tilmælið frá Pál Weihe, lækna og granskara, og Høgna Debes Joensen, landslækna um grindadráp.

Tað var fyri tveimum árum síðani, at tilmælið kom frá teimum báðum læknunum um, at vit als ikki skulu eta grind:

– Tað er við sorblídni, at hetta tilmælið verður givið. Grindin hevur tænt føroyingum væl í mong hundrað ár og man eiga lívið í mongum føroyingi gjøgnum øldirnar. Men tíðir og umhvørvi broytast, og tí meta vit tað heilsufakliga neyðugt við hesum tilmæli, søgdu teir báðir í tilmælinum.

Tað var í høvuðsheitum tveir vandar, sum teir vístu á við at eta grind. Annar er, at dálkingarevni í grindini tykist at økja um vandan fyri at fáa Parkinsonsjúku hjá teimum, sum eta grind ofta. Hin er vandin fyri, at blóðtrýstið hækkar, og kálking í hálslívæðrum verður økt hjá fólkum við nógvum kyksilvuri í kroppinum. Illgruni um at nøringarevnini minka orsakað av dálkingarevnum í grind og spiki verður eisini kannaður.

At hetta er eitt ógvuliga kontroversielt mál prógvaðu reaktiónirnar, sum komu. Á tingsins røðarapalli vóru læknarnir niðurgjørdir av betrivitandi tingmonnum.

Bill Justinussen helt, at vit hava ikki brúk fyri granskarum, sum siga, at vit ikki skulu eta grind. Jenis av Rana helt, at kanningin ikki stendur mát vísindaliga - og at talan vara bara um tveir tilvildarligar læknar. Alfred Olsen segði, at meðan ágangurin fyrr kom uttanífrá, so kemur hann nú innanífrá.

Tað sigur seg sjálvt, at eitt so víðgongt tilmæli skapar røring. Grindadráp hevur so nógv við kenslur at gera.

Men vit kunnu ikki bara stinga høvdið í sandin. Er tað so galið, at grindin er so dálkað og so skaðilig, so skal tað sjálvandi fram - og so skulu tilmælini grundast á tann veruleikan. Vit eiga ikki blanda hetta saman við trýsti frá umhvørvis-



verndarfeløgunum. Men høvdu fólkini í hesum felagsskapum tikið við læru av hesum, og fingið heimlond teirra at steðgað ógvusligu dálkingini, so kundu vit fingið respekt fyri teimum.

Men tað er ikki tað, sum tað gongur út uppá hjá hesum víðgongdu felagsskapum. Heldur er talan um at skaffa pengar frá marglætis-milliónungum - so fólk kunnu hugna sær á ævintýraferð saman við monnum sum Paul Watson. Teirra umsorgan fyri náttúruni er tann reini glantrileikur.

Men vit í Føroyum eiga at taka hendan vandan í álvara og taka avgerðir út frá tí, at grindin er ikki heilsugóð mannaføði – og verður tað valla í framtíðini.

**Prógv um skaðiliga føði skulu sjálvandi fram**

# Jógvan Hansen í fremstu røð í Íslandi

Klaksvíkingurin skal aftur í ár kappast um at sleppa at umboða Ísland í evropisku sangkappingini í sjónvarpinum, tí hann eigur ein av teimum 15 útvaldu sangunum, sum eru við.

Í gjár varð almannakunngjørt, hvørjir sangir sleppa við í Söngvakeppni Sjónvarpsins í Íslandi. Tilsamans 174 sangir komu inn til kappingina, og ein dómsnevnd hevur valt 15 burturúr. Ein av teimum eigur Jógvan Hansen saman við Vignir Snær Vigfússon.

Sostatt verður Jógvan við triðja árið á rað, tá fremstu sang- og tónleikanøvn í Íslandi fara at kappast um at sleppa at umboða Ísland, tá stóra evropiska finalan verður í Týsklandi í mai mánaði komandi ár. Og ikki er óhugsandi, at Jógvan Hansen enn eina ferð verður millum tey fremstu.

Í fjør vóru bara nakrar og tjúgu atkvøður á muni millum hann og vinnaran, Jóhanna Guðrún, sum í evropisku finaluni vann Íslandi eitt flott annaðpláss. Jógvan sang í fjør sangin, »One More Day«, sum Bubbi Morthens hevði skrivað, og í fyrraárið bleiv Jógvan nummar fýra við sanginum, »I Think The World of You«.

Sigast má, at væl liggur fyri hjá Jógvani at gera um seg sum sangari í Íslandi. Síðani hann í 2006 vann íslendsku útgávuna av X Factor-kappingini, tá hann fekk 70 prosent av atkvøðunum, hevur hann javnan verið frammi í sambandi við bæði framførslur, útgávur og – sum nú – kappingar.





**Hava ikki ráð til sparingar**

FRANTS JENSEN
KJAK Á SÍÐU 25



**Sambandið álitið**

ZACHARIAS BECH
KJAK Á SÍÐU 26

# Fyrsta samgonga hjá Atla Dam

Í gjár - fyri 40 árum síðani - var løgtingsval í Føroyum. 7. og 8. november vóru síðbundnir valdagar tey árini, tá løgtingsval altíð var fjórða hvørt ár. Frá 1946 til 1978 vóru reglulig val, fyrsta valið í úrtíð síðani heimastýrislógina var í 1980.

Men á løgtingsvalinum í 1970 hendu fleiri broytingar. Fleiri nýggj fólk vórðu vald á ting. Ein teirra var Atli Dam, sum sama várt varð valdur til landsstýrismann. Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin høvdu skipað samgongu við Petur Mohr Dam sum løgmanni eftir valið í 1966. Men Petur Mohr Dam doyði í 1968, og Kristian Djurhuus úr Sambandsflokkinum tók við su løgmaður. Men eftir valið í 1970 varð Atli Dam valdur til løgmann, og trýflokkasamgongan helt fram.

Javnaðarflokkurin var størstur við 27,2 prosentum, Sambandsflokkurin fekk 21,7 og Sjálvstýrisflokkurin 5,6 prosent. Atli Dam sat sum løgmaður út í eitt frá 10. desember í 1970 til 5. januar í 1981. Atli Dam var afturvaldur til løgmann 10. januar í 1985 og sat fram til januar 1989, og aftur frá januar 1991 til januar 1993 – tilsamans var hann løgmaður í 16 ár. Atli Dam doyði í 7. februrar 2005.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*